**Álit**
**í**
**ungdómstingsmáli nr. 10/2010: Uppskot til samtyktar um at gera tað lættari hjá almennum stjórum at siga fólki úr starvi**

Skúlin á Ziskatrøð hevur lagt málið fram tann 8. februar 2010, og eftir 1. viðgerð er tað beint í Rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. februar 2010.

Nevndin mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið. Hetta tí, at tað í fleiri førum hevur víst seg í samfelagnum, at tað er torført hjá einum almennum stjóra at siga fólki úr starvi. Tað hoyrist ofta, at tað er nærum ógjørligt at siga einum fólk úr starvi, tí at sáttmálin ger tað trupult. Hetta, hóast at tað kann kosta arbeiðsgevaranum nógvar pengar. Onkuntíð hevur stjórin verið noyddur til at gjalda løn til starvsfólkið, sjálvt um viðkomandi ikki arbeiðir har longur, ella sjálvt um starvsfólkið ikki ger sítt arbeiði til fulnar, til dømis vegna langa sjúkralegu ella serliga vánalig arbeiðsavrik.

Ynskiligt hevði verið, um tað eingin munur varð á privatum og almennum starvsfólkum. Men nevndin ætlar sær ikki nærri inn á hetta økið.

Nevndin mælir til, at sáttmálar og treytir fyri uppsøgnum skulu broytast soleiðis, at til ber at siga starvsfólkum úr starvið, um haldgóðar orsøkir eru til hetta. Men tað er t. d. ikki nokk, um ein stjóri ikki dámar eitt starvsfólk. Harafturímóti er tað nokk, um eitt starvsfólk er ofta burtur vegna sjúka ella er nógv burtur frá starvinum av øðrum orsøkum og ikki ger sítt arbeiði ordiligt. Tað er eitt krav, at stjórin kemur við eini haldgóðari grundgeving fyri eini uppsøgn.

Endamálið er jú at fáa betri fólk inn í starvið og ikki lata ódugnalig fólk hanga út og bara fáa pengar uttan at gera nakað. Hetta skal tó gerast við tí fyrivarni, at politikarar ikki skulu blanda seg for nógv uppí.

Ein samd nevnd tekur við hesum viðmerkingum undir við málinum og mælir Ungdómstinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 9. februar 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Birita Poulsen<br>formaður | Anfinn Kallsberg | Hergeir W. Lognberg |
| Sára Petersen | Kristian Martin Juul | Fríðunn Jacobsen |
| Katrin Dahl Hanusson | Sudarat Niyomtham | |
| Sólrun Henrysdóttir | Henrik Joensen | |